## Halda nógv av Scholes

Ungi miðvallarin Cesc Fabregas segði í farnu viku við The Sun, at tann spælarin, sum hann sær mest upp til í Onglandi, er United-miðvallarin Paul Scholes, sum hevur víst stórspæl í hesum kappingarárinum.

– Hann er ein ótrúliga klókur spælari, og honum kann eg læra nógv av. Hann er ein høvuðsorsøk til, at tað gongur so væl hjá United, segði Fabregas millum annað, og Thierry Henry tekur undir við Fabregas:

– Fyri meg er Paul Scholes ársins spælari í Onglandi í ár. Hann hevur ongantíð fingið ta viðurkenning, sum hann hevur uppiborið, og eg vóni, at hann verður valdur til ársins spælara í ár. Eg ætli mær í øllum førum at atkvøða fyri honum, segði Henry við The Sun.



## Blackpool hongur í

Claus Bech Jørgensen sat á beinkum frá byrjan, tá Blackpool spældi í ensku League 1 leygardagin. Blackpool hevur rættiliga toga seg upp eftir stigatalvuni seinastu vikurnar, og aftur hesaferð eydnaðist liðnum at vinna. Dysturin, sum var á útivølli ímóti Leyton Orient, endaði við 1-0 sigri til Blackpool. Málið kom fimm minuttir fyri tíð. Claus Bech Jørgensen var settur á vøllin seinastu minuttirnar, tá ið leiðslan hjá Blackpool skuldi verjast. Blackpool er nummar 6 av 24 liðumí triðbestu ensku deildini.

TB-Dráttur 1-3 (27-25, 22-25, 22-25, 18-25)

# Dráttur fram við TB

**Við sigri í Trongisvági ímóti TB í meistaradeildini hjá kvinnum hevur Dráttur nú lagt TB aftur um seg á stigatalvuni. Nú liggur Dráttur á 2. plássi**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

TB og Dráttur eru tvey av liðunum, sum royna at fanga oddaliðið, ÍF, aftur í bestu kvinnudeildini í flogbólti. Sunnudagin møttust hesi bæði í høllini í Trongisvági, og undan dystinum var greitt, at vinnarin legði seg á annað plássið í meistaradeildini hjá kvinnum.

Heimaliðið fekk betru byrjanina uppá dystin. Munurin á liðunum var at kalla eingin í fyrsta setti. Tey fylgdust væl at allan vegin, og seint í settinum var greitt, at liðini máttu spæla út um tey vanliga 25 stigini. Her vóru kvinnurnar av Tvøroyri drúgvari. Tær vunnu settið 27-25, og sostatt høvdu tær fingið ein góða byrjan uppá dystin.

### Dráttur tók yvir

Síðstu dystirnar hevur TB spælt uttan vanliga hevaran, Maju Popovic. Hon er við barn, og hevur tí gjørt av ikki at spæla meir á hesum sinni. Um hetta hevur ávirkað avrikini hjá TB skal vera ósagt, men gongdin hjá TB hevur ikki verið tann besta síðstu dystirnar.

Eisini í dystinum móti Drátti tóktist TB hava tað trupult. Sjálvt um tær vunnu 1. sett, so sást í 2. setti, at Dráttur var heldur oman á. Heldur ikki her var munurin serliga stórur, men tá settið leið ímóti endanum, gjørdist greitt, at her fór Dráttur helst at vinna.

Vágakvinnurnar drógu eisini longra stráðið í 3. setti, sum tær vunnu 25-22.

Í triðja setti var gongdin á leið tann sama, sum í øðrum. Munurin var ikki serliga stórur, men Dráttur helt seg eitt vet frammanfyri vertirnar. Aftur hesaferð var Dráttur heldur betri, og at enda vunnu tær eisini triðja sett 25-22.

Sostatt førdi Dráttur nú 2-1, og tær tóktust hava fult tamarhald á støðuni. Nú skuldi TB inn á vøllin at vinna síðstu tvey settini fyri at tryggja sær sigurin, men so bleiv ikki.

Fjórða settið gjørdist nevniliga eisini síðsta settið. Her kom munurin á liðunum veruliga til sjóndar. Nú hevði Dráttur fingið róð yvir spælið, og tær koyrdi sigurin trygt heim. Tær løgdu seg á odda mest sum alt fyri eitt, og munurin millum liðini vaks støðugt hetta settið. At enda vann Dráttur 25-18, og sostatt vunnu tær dystin 3-1.

Við sigrinum er Dráttur fari fram við TB á stigatalvuni, soleiðis at Dráttur nú liggur á øðrum plássi.



*Dráttur vann rættiliga tryggan sigur á TB í Trongisvági. Við sigrinum er Dráttur farið fram við TB á stigatalvuni*

KÍF-Mjølnir 3-1 (21-25, 25-23, 25-22, 25-16)

# KÍF av aftasta plássi

**Mjølnir kom væl frá byrjan, men KÍF vendi dystinum og vann at enda ein sannførandi sigur. Við sigrinum eru tær nú farnar av aftasta plássi**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*



*Mjølnir fekk heldur betru byrjanina, men síðstu settini lat KÍF ongan iva vera um, hvat av liðunum var betri henda dagin*

Brak var í botninum í meistaradeildini hjá kvinnum, tá KÍF tok ímóti Mjølni. KÍF og Mjølnir hava ligið og kappast um ikki at liggja aftast í alt ár, men munurin á liðunum hevur ikki verið serliga stórur.

Tvær ferðir hava liðini møtt hvørjum øðrum í grundspælinum. Munurin var ikki so stórur, tá liðini møttust fyrstu ferð í Kollafirði, men tann dystin vann Mjølnir 3-1. Í seinna dystinum var munurin tó stórur. Tá var KÍF nógv betra liðið, og kvinnurnar úr Kollafirði vunnu henda dystin 3-0. Tí væntaðu áskoðararnir í Kollafirði sær eisini ein spennandi dyst.

### Mjølnir kom væl í gongd

Í fyrsta setti var ikki stórur munur á liðunum. Tey fylgdust stóran partin av settinum, men móti endanum drógu gestirnir tó frá. Tær fóru nøkur stig fram um KÍF, og hesa leiðslu megnaði Mjølnir at halda allan vegin. Tær vunnu fyrsta sett 25-21.

Í øðrum settið var gongdin ikki heilt ólík tí í fyrsta setti. Eisini her fylgdust liðini at kalla allan vegin, men KÍF tóktist hava munin. Móti endanum fór KÍF eisini fram við Mjølnir, og heimaliðið vann annað settið 25-23.

### KÍF komið í gongd

Nú stóð aftur á púra jøvnum millum liðini, men líkt var til, at KÍF rættiliga var komið í gongd eftir sigurin í øðrum setti. KÍF setti seg nevniliga á dystin nú, og triðja sett endaðu kvinnurnar úr Kollafirði eisini við at vinna.

Heldur ikki her var munurin tann heilt stóri, men KÍF tóktist tó nú at hava fingið takið á Mjølni. Móti endanum av triðja setti dró heimaliðið frá, og at enda vunnu tær hetta settið 25-22.

Nú var bara ein vegur hjá Mjølni, um tær skuldu gera sær vónir um at vinna dystin. Tær skuldu vinna fjórða sett, men hetta vildi KÍF ikki loyva teimum. KÍF legði nevniliga fyri sum eitt ódnarveður í triðja setti. Mest sum alt fyri eitt løgdu tær seg á odda, og munurin vaks bara, sum settið leið. At enda vann KÍF ein sannførandi 25-16 sigur í fjórða setti, og sostatt vunnu teir týdningarmikla botndystin ímóti Mjølni.

Við sigrinum lagt Mjølnir aftur um seg í meistaradeildini hjá kvinnum, soleiðis at Mjølnir nú liggur einsamalt á aftasta plássi.